## VIÐMERKINGAR

# Kommunurnar skulu ikki yvirtaka nakað, sum landið hevur ábyrgduna av

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Uppgávurnar eru greiðar, kommunurnar hava átikið sær ábyrgduna av barnaansing og gera sjálvar av um tær vilja gera nakað við barnaansingarøkið.

Landið hevur einsamalt ábyrgduna av allari eldraansing og ger sjálvt av, hvussu nógv tað vil gera við eldraøkið

### Landið tvingar kommunurnar til barnaansing

Landstýrismaðurin í hesum málum skal vegna landið spara pengar og er nú við at gera lóg um, at kommunurnar skulu gjalda til foreldur, sum ikki kunna fara út og arbeiða vegna vantandi barnaansing

Við hesari lóg tvingar landið kommunurnar til at syrgja fyri, at barnaansingin er nøktandi hjá øllum kommunum.

Kommunurnar mugu tvinga landið til at nøkta ansingina á eldraøkiðnum. Sum sagt eru uppgávurnar greiðar, landið hevur alla ábyrgduna av eldraøkinum, men sum øll vita so hevur landið slett ikki nøkta tørvin og hevur tvinga kommunurnar til at bygt sambýlir o.a., við einki at gera

Tá ið landið nú tvingar kommunurnar til at byggja barnaansingarpláss, má tað verða ein sjálvfylgja, at landið byggjur ansingarpláss til tey eldru sum ikki klára seg sjálvan, hervið fáa kommunurnar eisini ráð til at byggja barnaansingarpláss, tí tær sleppa undan at byggja sambýlir, røktarheim o.a., sum tær ikki hava ábyrgduna av.

### Kommunurnar gjalda

Tey fólkavaldu lóggeva soleiðis, at kommunurnar koma at gjalda rokningar hjá landinum tí landið manglar pengar og tað eru nógv dømi um hetta t.d.

- FAS- skatturin hækkar
- Botnfrádrátturin hækkar
- Rentufrádrátturin
- Barnaverndurnar
- Vantandi barnaansing

Tað er eingin avtala, sum er eftirfarandi, um at landið afturrindar kommununum nakað sum helst.

### Greið avtala

Uppgávubýti millum land og kommunurnar er greitt á barnaansingar og eldraøkinum, tann einasti sum skal halda avtaluna er landið.

# Aftursvar til hjartasuff (15-3)

**Elma Fornagarð**
*470 Eiði*

H. J. Garðalíð, tú skuldi tikið hattar aftur, sum tú hevur skrivað, tí eg veit, at í Kongagøtu skal man vera edrú/ur við at búgva har: Eg kláraði tað ikki.

Tú kann ikki bestemma allastaðni.

Tú skrivar, at ein 70 ára gomul kona bleiv koyrd út, tað var rætt at gera tað, tí hon drakk sanniliga. (Nær hevur sodavatn verið í ølfløskum).

Hesi konu havi eg møtt í einum klubba, ikki bara eina ferð, men fleiri ferð.

Tit, sum hava við Blákross at gera, svarið ikki til hatta skriv, tí tit hava gjørt rætt.

Símin, tú skal hava mína stóru tøkk fyri tað, tú ger, tú hevur hjálpt nógvum, sum koma á Kafé Blákross.

Eg havi fingið góða hjálp, tí nú eri eg turrløgd.

**Takk fyri Blákross.**

Bussferðir

til Noregs
12.05. - 21.05. & 04.08 - 13.08
Vitjað verður m.a. í Gudvangen, Lærdal, Lillehammer, í Gudbrandsdalinum, í Lom, Geirenger, við Sognefjørðin, Balestrand og Bergen

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/bað innv.
7 nætur í dupultkamari við WC/bað innv. á hotellum í Noregi íroknað ½ vistarhald. Hartil ferðaleiðari og bussur á allari ferðini.

úr 6.295,-

til París
06.06. - 16.06.
Skipað verður aftur í summar fyri eini bussferð til býanna bý París. Tað er ein sera áhugaverdur býur, sum altíð hevur okkurt nýtt at bjóða. Ferðin verður í samstarvi við Hanstholm Turistfart. Ferðast verður í nútímans bussi, og við á ferðini verður danskur ferðaleiðari

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/baðinnv.
Bussferð til París íroknað uppihald á hotellum í dupultkamari við WC/bað.
Eisini á sjálvari bussferðini er morgunmatur og døgurði á kvøldi íroknaður.

úr 5.595,-

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

PEUGEOT 406 2.1 HDI DIESEL 7.PERS. STATIONCAR
Árg Nov'97, Km 111.000.
Vælhildin: Fj. Stýrt centrallás C.D. Anlegg -Alufelgur-Hiti í forsetrum- El.Rútar v.m. 7.persónar.
Kr. 140.000

MITSUBISHI LANCER 1.6 GLX I
Árg Juli'96, Km 114.000.
Vælhildin: Alufelgur- El. rútar- El.spegl- Centrallás- Radio v. bandspælara- Spoylari aftan v.m. .
Serprísur kr. 68.000.

OPEL VECTRA 1.8I GL
Árg Maj'95, Km 81.700.
Vælhildin:Centrallás- El. Spegl - C.D.Anlegg . v.m. Kr. 65.000

FIAT BRAVO 1.6 SX
Árg 96, Km 97.000. Vælhildin: Centrallás- El. Rútar- Radio v.bandspælara - Alufelgur.
Kr. 50.000

DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR
Árg Jun'98, Km 29.000. Sera vælhildin: El. rútar fr.-Takboylar- Centrallás-Radio v.bandspælara- El.spegl v.m. Seprísur kr. 86.000.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650



# Ársfundur hjá Grindamannafelagnum



*Í morgin verður ársfundur hjá Grindamannafelagnum í Norðurlandahúsinum í Havn*

*Savnsmynd*

**GRIND**
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 22. mars heldur Grindamannfelagið ársfund. Fundurin verður í Norðurlandahúsinum, og hann byrjar klokkan 14.00. Fundurin er almennur, og øll eru vælkomin.

Aftur í ár verður gestarøðari við. Hesa ferð kemur hann úr Grønlandi, hann eitur Henning Sloth Petersen og fer at tala um súgdjór í sjónum sum matarkelda, um dálking osfr. Hetta er eitt evni, sum verður nógv viðgjørt, bæði her heima, men sanniliga eisini aðra staðni. Hvat siga tey aðrastaðni? Hví? Høvi verður at seta honum spurningar.

Henning Sloth Petersen er ikki føroyingum ókendur. Hann er lækni og hevur áður starvast her í Føroyum, men hevur seinastu árini verið í Grønlandi.

Sum sagt eru øll vælkomin, og vónandi møta fólk fjølment.



Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!
AVIS BILÚTLEIGAN
Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo

Sølufólk til byggimarknaðin.

Vit søknast eftir sølufólkum til byggimarknað okkara í Tórshavn at byrja sum skjótast ella sambært nærri avtalu.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjótt vaksandi virkisøki innan bygging.
Tú kemur sum høvuðsøki at starvast við sølu í byggimarknaðinum, har tú eisini verður ein natúrligur partur av innkeypi sum heild.
Tú skalt saman við starvsfelagum tínum vera við til í tí støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

Vit vænta at tú:
- hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði
- ert fyrikomandi og útatvendur
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst líva upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum.

Umsóknin skal sendast til:
P/F Havnar Timburhandil
Heykavegur 4
Box 3038
FO-110 Tórshavn

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 31 12 50

TIMBUR HT HANDILIN
www.timburhandilin.fo

Lærlingur til Telebúðina í Tórshavn

"Nógvir vegir eru upp á fjallatindin, men útsýnið er altíð tað sama"
- kinverskt orðatak -

Søkt verður eftir lærlingi at læra til smásøluatstøðing í Telebúðini í Tórshavn.

Telebúðin í Tórshavn er ein av sjey telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin í Tórshavn søkja vit eftir einum lærlingi, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at viðskiftafólkið fær eina góða tænastu.

Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi lærupláss.

Til lærupláss ið ynskja vit eitt fólk við:
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við ymiskar samstarvsbólkar
- íðni at røkka ásett mál

Læ rutíðin er:
- 4 ár uttan útbúgving
- 3 ár við FHS
- 2 ár og 18 vikur við Studentsprógvi, HF ella HT
- 2 ár við HH

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Telebúðin í Tórshavn er opin allar vanligar handilstíðir, og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjølligari upplýsingar fáast við at venda sær til Hildibjart Hansen á tlf. 303030 ella til Starvsfólkadeildina á Føroya Tele.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. mars 2003 og skulu sendast til

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE